Ítróttar
Sosialurin
Nr. 99 • mikudagur • 24. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kappingarnevndin *skal* viðgera HB-málið



*Í HB tykjast tey í løtuni at hanga í leysum lofti. Higartil hevur felagið verið víðari – úti – aftur víðari og nú í ongamannalandi, tá talan er um ársins útgávu av kappingini um Løgmanssteypið*

**Dómsnevndin hjá FSF ógyldaði mánakvøldið úrskurðin hjá Starvsnevndini um, at HB hevði tapt í steypakappingini. Men úrskurðurin fríkendi ikki HB, og nú skal málið koyrast av nýggjum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Allir úrskurðir hjá Dómsnevndini eru endaligir. Tað verður staðfest í grein 42 í kappingarreglunum hjá FSF.

Spurningurin tykist tó vera, hvat hetta hugtakið inniber, og í fløkta málinum um spæliloyvið hjá Páll M. Joensen tykist hetta so ikki merkja, at seinasta punktum er sett.

### Niðurstøðan var tann sama

Síðani tað kom fram seinast í mars mánaði, at alt ikki ruggaði rætt viðvíkjandi spæliloyvinum hjá HB-framherjanum, hevur nógv verið ført fram um málið. Kanska eisini somikið nógv, at fleiri hava havt ilt við at fylgja við í tí, sum er farið fram.

Í botn og grund, so snýr málið seg um, hvørt Páll M. Joensen hevði loyvi at vera partur av liðnum, tá HB tann 25. mars vann á VB/Sumba í kappingini um Løgmanssteypið.

Staðfest er, at spæliloyvið hjá Páll tá ikki var komið fram til HB, og sambært strongu siðvenjuni á økinum, so er spælari tá at meta sum ólógligur.

Sambært grein 39 petti 3, so kann FSF taka mál upp, hóast kæra ikki er send inn. Tað var eisini tað, sum hendi, tá vantandi spæliloyvið kom undan kavi. Eins og fyri einum ári síðani – tá KÍ og B36 vórðu dømd at tapa dyst – so vildi Kappingarnevndin ikki einsamøll taka støðu í málinum. Tí varð hetta lagt fyri aðalnevndina, sum kom til júst somu niðurstøðu sum í fjør. Nevnliga at uttan spæliloyvi hevði spælarin ikki loyvi at spæla. Og at felagið tí skuldi tapa dystin.

### Ósemja í dómsnevndini

HB gjørdi alt fyri eitt greitt, at dómurin varð kærdur til Dómsnevndina. Her varð málið í fyrstu atløgu viðgjørt á fundi fríggjadagin, og mánadagin fyrilá so niðurstøðan.

Niðurstøðan hjá dómsnevndini framgongur aðrastaðni her á síðuni, men tað er merkisvert, at talan var um eina ósamda Dómsnevnd, sum kom við úrskurðinum. Meirilutin – Jónfinn Thomsen og Dánjal Andreasen – staðfestu, at formligir feilir vóru í málsviðgerðini, og at allar avgerðir í hesum vórðu ógyldagar. Ein niðurstøða, sum triði limurin, Høgni Høgnesen, als ikki var samdur í.

Við øðrum orðum vil hetta siga, at Dómsnevndin ongantíð tók støðu til kjarnuna í málinum. Allar avgerðir hjá Dómsnevndini eru endaligar, men í hesum førinum varð juridiska tulkingin so tann, at niðurstøðan flutti málið aftur til dag null. Altso fer kappingarnevndin nú av nýggjum at viðgera spurningin, hvørt HB hevði loyvi at nýta Páll M. Joensen, tá teir 25. Mars.

## Staðfestingin hjá Dómsnevndini

Tá dómsnevndin á fundi mánakvøldið viðgjørdi málið um spæliloyvið hjá Páll M. Joensen, hevði niðurstøðan sum so einki við kjarnuna í málinum at gera.

Niðurstøðan hjá Dómsnevndini var, at formliga handfaringin av málinum var skeiv, og tí ógyldagi nevndin allar úrskurðir, sum higartil vóru gjørdir.

Grein 40 í kappingarreglunum fyri FSF staðfestir, at at »Brot á hesar reglur verða viðgjørd av Kappingarnevndini…«.

Grundað á hetta staðfesti Dómsnevndin, at tað var skeivt av Kappingarnevndini, tá hendan skeyt málið frá sær og yvir til Starvsnevndina. Somuleiðis staðfesti Dómsnevndin, at Starvsnevndin ikki hevði heimild til at viðgera málið.

Stóra spurnarteknið eftir hetta varð, hvørt dómurin skuldi skiljast soleiðis, at málið nú var avgreitt, ella um hetta merkti, at málið skuldi aftur til Kappingarnevndina.

Tann spurningin fekk FSF Christian Andreasen, løgfrøðing, at tulka, og tað er tann niðurstøðan, sum nú hevur borið við sær, at málið nú aftur er at finna í kappingarnevndini.

**-mørk**

## KÍ og B36 fylgja við

Hjá teimum báðum feløgunum, sum í fjør vórðu dømd at tapa dyst í steypakappingini, veðrur fylgt væl við, hvussu leikur fer í málinum um spæliloyvið hjá Páll M. Joensen.

Málið er nevnliga meinlíkt tí, sum feldi B36 og KÍ fyri einum ári síðani. Eisini var málsgongdin tá tann sama, sum Dómsnevndin nú hevur ógildað. Nevnliga at tað var Starvsnevndin - og ikki Kappingarnevndin – sum gjørdi úrskurð í málinum.

Tos um endurgjaldskrav fyri møguligan inntøkumiss hevur eisini verið frammi, men enn standa bæði feløgini tó í bíðistøðu eftir, hvat hendir í málinum. Fyrsti – ella skuldu vit kanska sagt triði – parturin av svarinum fæst helst, tá Kappingarnevndin nú aftur fer at viðgera aktuella málið.

**-mørk**

## Landsdystur móti Íslandi

Komandi vikuskifti skal manslandsliðið í flogbólti leika tveir landsdystir ímóti Íslandi í Føroyum.

Fyrri dysturin verður leygarkvøldið kl. 19,00 í Høllini á Nabb, og seinni dysturin verður sunnudagin - á Norðoyastevnu - í KÍ-høllini kl. 15,30.

Dystirnir eru liður í fyrireiking hjá manslandsliðnum í flogbólti til EM-undankapping, sum verður í Norður-Írlandi um mánaðarskiftið juni-juli.

Føroyska manslandsliðið til vikurskiftið verður úttikið eftir venjingar í morgin, og eru allir útlendsku leikararnir heima í Føroyum í hesum sambandi.

Seinast liðini møttust var í EM-undankapping í Skotlandi í desember 2003, tá Føroyar vann 3-0 við settmuninum 25-22, 26-24 og 25-20.

Venjari hjá manslandsliðnum er íslendingurin Magnus Aðalsteinsson og Suni Hansen er hjálparvenjari.